## Evropa ynskir Hillary

Í Fraklandi og Týsklandi siga gott 40 prosent, at tey vilja hava Hillary Clinton at vinna næsta forsetavalið í USA. Tað sæst í einari meiningakanning, sum eisini vísir, at fyrrverandi forsetafrúan er tað best umtókta forsetavalevnið í Bretlandi, Italia og Spania. Eisini kanadiumenn vilja hava hana í Hvótu Húsini. Í Fraklandi og Týsklandi er Barrack Obama á øðrum plássi, og tað er hann eisini í Kanada.



## Ráevni í Eysturgrønlandi

Grønmlendska felagið Nuna Minerals er í ferð við at kanna, hvørji ráevni eru at finna fram við grønlendsku eysturstrondini. Tær seinastu fimm vikurnar hava fólk hjá felagnum tikið umleið 1.000 ymsar royndir frá Tasiilaq og suðureftir, og tær skulu nú kannast. Jarðfrøðingurin Anders Lie, sum stendur á odda fyri kanningunum, sigur við útvarpið í Nuuk, at nakrar av royndunum eru áhugaverdar, og tí eru vónirnar góðar, sigur hann.

# Norröna siglir í trygg



**Innspræningin av 45 milliónum krónum sum nýggjan partapening í Smyril Line og umleggingin av lánum ger, at Smyril Line nú er eitt trygt felag fíggjarliga. Men største uppgávan hjá nýggja stjóranum verður at finna felagnum fleiri bein at standa á**

FLUTNINGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í gjár kom tíðindaskriv frá Smyril Line, har greitt varð frá, at felagið hevði fingið tilført nýggjan partapening, samstundis sum lánini vórðu umløgd og afturgjaldingartíðin longd. Og sambært nýggja stjóranum í fyritøkuni, Andras Róin, er hetta júst andarúmið, sum Smyril Line so desperat hevur fyri neyðini.

– Higartil hevur fyritøkan livað frá hondini í munnin. Við nýggja partapeninginum og umløgdu lánunum ber fyri fyrstu ferð í mong ár til, at gera ætlanir fram í tíðina, fimm ár, tíggju ár. Og tað er ein heilt onnur støða, sigur Andras Róin.

Upprunaliga var Norröna fíggjað av trimum útlendskum bankum, tveimum týskum og einum hálendskum. Við umleggingini hevur Føroya Banki tikið yvir lánið í hálendska bankanum, meðan hinir báðir týsku framvegis eru við til at fíggja skipið. Samstundis er lánið, sum Føroya Banki veitir, økt úr tíggju upp í fimtan ár.

Eik er eisini ein lánveitari, men nú er talan um eitt samtakslán, har bæði Eik og undirfeløg eru við. Alt í alt fegnast Andras Róin um, at lánini eru umløgd, og at báðir teir stóru føroysku bankarnir nú eru við til at fíggja felagið.

Eisini hava Framtaksgrunnurin og TF Holding umlagt lán til partapening, og tað er jú ein ovurhonds stór hjálp, og ikki minst, at samstarvsfelagið hjá Smyril Line, Blue Water, er vorðin partaeigari við 20 milliónum.

Samlaðu lánini í felagnum eru knappa hálva milliard.

### Vaksandi søla

Hendankapitalinnspræningin hevur alt at siga fyri Smyri Line.

- Higartil hevur tað verið ein mánaður á gangin, tríggjar mánaðir á gangin, stutt sagt ein kampur fyri at yvirliva. Hetta er so fyrstu ferð tey seinnu mongu árini, í hvussu er síðani nýggja Norröna kom, at vit kunnu leggja langtíðar strategiskar ætlanir fyri fimm, tíggju ár fram í tíðina, sigur Andras Róin.

Í kortinum liggur, at farmaskip skal leigast at røkja farmaflutningin um summarið, nakað, sum longu er roynt í ár. Smyril Blue Water, flutningsfelagið, sum Smyril Line eigur saman við Blue Water, leigaði Hoburgen til farmaflutningin, tí Norröna stutt sagt ikki nøktaði tørvin á bæði farmaflutningi og bilum hjá ferðafólkinum.

Hetta skipið fór avstað fyri seinastu ferð fyrradagin.

- Um veturin nøktar Norröna so dánt tørvin á farmaflutningi og bilum. Vit hava jú tann positiva trupulleikan, at tað viðhvørt manglar pláss; tað gongur faktist so væl, sigur Andras Róin, sum visir á, at hóast hetta eyka skipið hevur siglt í summar, so hevur verið útselt á bildekkinum á Norrönu í samfullar tríggjar mánaðir.

Og tað gongur betri og betri hjá Smyril Line. Í fjør hevði felagið ein vøkstur í ferðaseðlasøluni upp á oman fyri 20%, og higartil í ár er vøksturin áleið 18% á øllum rutum.

- Á tí økinum hevur gingið framúr, men umborðsølan er ikki nøktandi, so nú skulu vit inn at hyggja upp á tað, sigur Andras Róin.

### Betra tænastuna

- Tað vísir seg, at tá vit hava 900-1000 fólk umborð, er